

PARÍS
2.695,-
LONDON
2.585,-
STOCKHOLM
2.790,-
MADRID
2.995,-
ROM
2.990,-*
MALAGA
2.995,-*

Prísir úr:

2585.-

Galdandi frá 1. juli til 20. august.
Prísurin er fyri hvønn aftur og fram, um tvey ferðast saman, og verða burturi leygarnátt. Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast eina viku áðrenn fráferð, børn -50%, smábørn -90%. Prísurin er eisini galdandi úr útheiminum til Føroya.
Ferðaavgjald kemur afturat prísinum.
* Gisting í Keypmannahavn ikki íroknað.

Atlantic Airways
- setir Føroyar í miðdeplin
Tel 333 900 · www.atlanticairways.fo

SANSIR TEL 355355

# Jóansøkubál

*Nógvastaðni er tað vorðið vanligt at brenna jóansøkubál. Í Havn er siðurin longu fleiri ára gamal, og eisini vestmenningar hava gjørt tað til fastan tátt*



*Vestmenningar fara at hava jóansøkubál á sandinum uttan fyri grótkastið á Fitjum*

EDVARD JOENSEN

Aftur í ár fer Vestmanna Ítróttarfelag at skipa fyri hugnaløtu við jóansøkubáli á sandinum Inni á Fitjum í Vestmanna.

Hetta er tiltak, sum er vorðið afturvendandi, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Jóansøkutiltakið hjá Vestmanna Ítróttarfelag verður í ár jóansøkuaftan, leygardagin 24. juni.

Byrjað verður við ponyríðing klokkan 15.00. Klokkan 16.00 verður grillin tendrað, og til ber at grilla pylsur og fáa okkurt leskandi afturvið.

Sungið verður vanliga við slík høvi, og vestmenningar ætla heldur ikki, at tað skal fara framvið. Teir hava sanghefti til tað sama, siga teir.

Men alt kostar pengar, og tiltakið hendan dagin er fyri at fáa pengar til ítróttarfelagið. So lutaseðlasøla verður eisini. Fyrireikararnir siga, at nógvir góðir vinningar eru á lutaseðlunum.

Til eitthvørt jóansøkubál eigur eisini ein røða at vera. Og jóansøkurøðan í Vestmanna í ár verður hildin klokkan 18.00. Tað verður varaløgmaður, Høgni Hoydal, sum fer at halda jóansøkurøðuna á sandinum Inni á Fitjum í Vestmanna ár 2.000.

Sjálvt bálið verður tendrað, tá eitt sindur er liðið út. Klokkan 19.00 ella seinni, skriva vestmenningar í tíðindaskrivinum.

Annars hava vestmenningar nýliga vaksið um sandin Inni á Fitjum. Tað var soleiðis, at við teimum útbyggingum, sum verið hava fram við sjósíðuni í Vestmanna, hvarv eisini tann gamli sandurin. Síðan varð sandur pumpaður upp aftur uttan fyri grótkastið Inni á Fitjum. Men ikki alt tóktist nóg gott har. So nú í summar er meira sandur lagdur upp har.

Eisini aðrastaðni verða jóansøkubál tendrað.

Í Havn plagar, sum sagt, at vera jóansøkubál í Sandágerði á hvørjum ári.

Um viðrar er ætlanin at hava bálið í kvøld, verður sagt av Býráðnum.

Shjálvt tiltakið byrjar við ponyríðing, sum Føroya Ríðingarfelag skipar fyri klokkan 20.00.

Klokkan 21.00 verður bálið tendrað, og tá fer Eyðun Johannesen, sjónleikari, at halda røðu.

Tað eru skótar, sum gera bálið, og tað eru eisini skótar, sum fara at selja kaka og bollar á økinum.

Felagssangur verður, sum vera man, og eisini verður føroyskur dansur á sandinum, sum vanligt er.






Droymir tú um at lata pengarnar arbeiða fyri teg, so er íløga í virðisbrøv tað rætta. Kaupthing hevur vitanina, ið kunnu gera tínar dreymar til veruleika. Tosa við okkum og vit finna í felag eina loysn, ið hóskar til júst tín tørv.

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com

SANSIR TEL 355355